Rundskriv

um

barnsburðarfarloyvi

Við heimild í sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið, dagfestur 10. juli 1998, avtalu millum Føroya Landsstýri, dagfest 31. januar 1986 við seinni broytingum, og løgtingslóg nr. 37 frá 23. apríl 1999 um foreldrafráveru orsakað av barnsburði, føðing og ættleiðing verða hesar reglur ásettar um barnsburðarfarloyvi:

§ 1. Lærarinna, ið er við barn, eigur at senda umsókn um barnsburðarfarloyvi til Undirvísingar- og Mentamálastýrið í seinasta lagi 3 mánaðir, áðrenn hon væntar sær at eiga.
Stk. 2. Læknaváttan skal latast inn saman við umsóknini. Í henni skal standa, nær umleið hon skal eiga.
Stk. 3. Lærarinna, sum er við barn, hevur rætt til burturveru frá arbeiði í sambandi við barnakonukanningar.

§ 2. Lærarinna kann fáa barnsburðarfarloyvi við løn í tilsamans 24 vikur. *Stk. 2.* Lærarinna fær vegna óarbeiðsføri løn í mesta lagi 8 vikur, áðrenn hon væntar sær at eiga. Hetta tíðarskeiðið er íroknað tær 24 vikurnar sambært stk. 1.
*Stk. 3.* Lønin smb: stk. 1 er tann fasta lønin viðkomandi fekk, áðrenn umsóknin var send Undirvísingar- og Mentamálastýrinum.

§ 3. Umframt farloyvi smb. § 2 kann lærarinna fáa frí í 5 mánaðir uttan løn og uttan miss í starvs- og lønaraldri.
*Stk. 2.* Umsókn um longt farloyvi skal sendast Undirvísingar- og Mentamálastýrinum í seinasta lagi 1 mánað, áðrenn farloyvið byrjar.

§ 4. Umframt farloyvi smb. § 2, stk. 1 og § 3, stk. 1 kann lærarinna fáa upp í 6 mánaða sjúkrafrí, tá hon við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur og/ella hana sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum. Í slíkum umstøðum verður veitt henni løn smb. § 2, stk. 3.
*Stk. 2.* Umframt tær í stk. 1 nevndu sømdir kann setanarmyndugleikin gera av at veita meiri enn 6 mánaða sjúkraløn. Læknaváttan hesum viðvíkjandi verður um Undirvísingar- og Mentamálastýrið send landslæknanum, ið ger av, um viðkomandi er óarbeiðsfør ella ikki.

§ 5. Fellur partur av teimum 24 vikunum smb. § 2 í summarfrítíðini, verður farloyvið longt við so nógvum døgum, sum falla í summarfrítíðini, tó í mesta lagi 5 vikur.

§ 6. Lærarinna skal so skjótt sum møguligt eftir, at hon hevur átt, boða Undirvísingar- og Mentamálastýrinum frá, nær hon hevur átt.

§ 7. Ættleiðir lærarinna barn, fær hon eftir umsókn tænastufrí í mesta lagi 24 vikur við løn.

§ 8. Lærari, ið verður pápi, kann eftir umsókn fáa frí í ein mánað við ongari løn. Sama er galdandi, tá hann ættleiðir barn.

§ 9. Hetta rundskriv kemur í gildi 1.august 2000, og samstundis fer úr gildi "Kunningarskriv um barnsburðarfarloyvi",dagfest 10. desember 1991.

**Viðmerkingar**:

Løgtingslóg nr: 37 frá 23. apríl 1999 um foreldrafráveru orsakað av barnsburði, føðing og ættleiðing ásetur reglur, sum í ávísan mun eru tær somu sum rundskrivið. Lógin viðvíkur bara rættinum at vera burtur úr arbeiði, men umrøður ikki spurningin um løn ella dagpening í hesum tíðarskeiðnum. Sambært § 1, stk. 1 í lógini hevur pápin rætt til farloyvi í 10 vikur, men samstundis verður gjørt vart við, at farloyvi er uttan løn, og at tíðin verður tikin burtur av tí tíðini, sum mamman hevur rætt til farloyvi. Lógin gevur sostatt pápanum rætt til longri burturveru uttan løn, men í sama mun verður farloyvið hjá mammuni stytt.

Undirvísingar- og Mentamálastýrið, 6. juni 2000

Hensar Ellingsgaard
deildarstjóri